| **Heiti á verkætlan**: Trolsegl | **Ár byrjan og endi**: Jan – des 2009 |
|---|---|
| **Skrivað hevur**:<br>Navn:<br>Stovnur ella virki:<br>t-postur: | <br>Kristian Zachariassen<br>Havstovan<br>Krizac@hav.fo |

**Endamálið við verkætlanini**:

At royna við seglum á trolinum ístaðin fyri at nýta kúlur. Seglini verða sett á vengurnar og miðjuna á trolinum.
Endamálið er at spara orku.

**Samandráttur av úrslitum**:

Peter Højgaard úr Runavík hevur í mong á havt eitt hugskot, sum hann eisini hevur roynt sjálvur. Hetta hugskot er at nýta eitt segl á trolinum ístaðin fyri kúlur. Á tann hátt metir hann, at olja kann sparast við at minni mótstøða verður, tí færri kúlur eru á trolinum.
Havstovan hevur saman við Peturi gjørt royndir við hesum segli umborð á 3 ymiskum skipum, Magnusi Heinasyni, Artic Viking og Vesturtúgvu. Royndirnar við hesum seglum vístu, at trolið ikki varð munandi lættari ella tyngri at tóva, men gapið á trolinum varð størri, tá seglið var á. Hæddin á trolinum øktist um ein metur, og avstandurin millum trolspíssarnar øktist um 2 metur.
At trolið gapar meira kann vera gott, tá fiskað verður eftir ávísum fiskasløgum. Millum annað upsi og hýsa kunnu standa upp frá botni, og tá er gott at hava eitt trol, sum gongur høgt. Fiskasløg, sum millum annað havtaska ganga fast á botni, men lata seg bert reka av sjálvum trolinum. Tá er gott, at trolið er breitt, soleiðis at sjávt trolið fiskar yvir eitt størri øki.

| | |
|---|---|
| **Váttan frá verkætlanarleiðara:** | 16/2- 2010 |